**MINNINGARORÐ**

## Niclas Davidsen á Skúr til áminnis
### f. 19.6 1974 – d. 25.11. 2000



Kalt er í veðrinum – ælaveður og myrkt. Hyggi út gjøgnum vindeyga, síggi at tey seinastu bløðini eru nú dottin av trøunum og fúka nú runt í túninum. Tað skýmur, hesin dagurin fer at halla, eins og nú, bert ein lítil mánaði er eftir av hesum árinum. Vit eru komin inn í adventuna. Jólini nærkast – tíðin, tá ið øll eru glað og gleðast við familju og vinum. Men tað er ikki enn! Vit skulu ígjøgnum desember fyrst. At skula koma ígjøgnum desember, plagar væl ikki at fella nøkrum tungt, sjálvt um myrkt er størsta partin av samdøgrinum. Men nú!

Stóra sorgin hevur aftur vitjað í heimbygd míni. Ein ferðsluvanlukka tíðliga leygarmorgunin 25. november, tók ein av okkara ungu. Hesin desember mánaði verður ikki lættur at koma ígjøgnum hjá tykkum, sum nú hava mist.

Troystarans orð kunnu kanska hjálpa tykkum, men tit hava mist eitt tað dýrasta tit áttu. Sonur tykkara er farin. Hann er farin undan okkum og vit standa spyrjandi eftir. Spyrjandi, tí vit skilja ikki, hví hansara tími longu var komin. Men sjálvt um sorgin nývir, so er ein, ið kann hjálpa, og sum sálmaskaldið so vakurt sigur:

Tyngir á teg sorgin harða
tykist einki ljós at sjá,
til tín Guð tú tá skalt fara
altíð er har hjálp at fá;
er tín trúgv sum fjallið sterk,
virka kann hon undurverk,
senda vil Guð tær til bata
meir, enn heimsins vísu fata.

Niclas var tvey ár eldri enn eg. Aftrat tí, at vit vuksu upp í somu bygd, komu vit serliga nógv saman, tey árini vit róðu við Nólsoyingi. Stuttligt var tað og vit høvdu mangar góðar løtur saman. Trupulleikarnir vóru sjáldan so stórir, at teir ikki blivu vendir til skemt.

»Nú eru vit blivnir danskarar« er eitt tað seinasta tú segði við meg. Niclas hevur búð í Randers í nøkur ár og eg í Aalborg. Niclas skuldi læra til sløkkiliðsmann. Spenningur og vandi, útrykningur við fullari ferð – ja, eg dugi at síggja teg fyri mær. Tú hevði verið ígjøgnum alskyns royndir. Tú vísti mær ymisk diplom tú hevði fingið, einaferð eg var og vitjaði teg í Randers. Tú hevði helst funnið títt lívsstarv, og vegirnir lógu opnir fyri tær. Ætlanin mundi vera, at tú einaferð skuldi vera sløkkiliðsmaður í Føroyum.

Niclas kendi nógv, og nógv kendu Niclas. Mangan havi eg verið spurdur um eg kendi Niclas. Í Havn mundu tað vera fá, um okkara aldur, sum ikki kendu teg. Flest øll kapp-róðrafólk, sum róðu tá ið vit róðu, kendu ella vistu hvør tú vart. Tú tosaði við øll og fekst øll at flenna. Niclas var væl umtóktur!

Einaferð sleyrdu vit kirkjugarðin í Nólsoy, tú og eg. Tosaðu í spølni um, hvar á leið í garðinum vit einaferð komu at liggja. Báðir væntaðu vit at koma at liggja uppi við portrið, men tað kom tíverri ikki at passa.

Tað skýmir. Hesin dagurin er farin at halla. Men tín dagur endaði longu á miðdegi. Framanfyri lá allur seinnaparturin og kvøldið. Eg fekk ikki komið til jarðarferðina hjá tær, men mínir tankar eru har heima og eg takki tær fyri alt, vit høvdu saman.

Góðu tit bæði Marnar og Marianna, og tit, sum stóðu Niclasi næst. Harrin styrki og troysti tykkum, nú eingin Niclas kemur heim at vitja tykkum á jólum.

**Leif**

## Atni Jensen
### f. 26.04-1953 - d. 16.11-2000



Atni Jensen er farin, bert 47 ára gamal.

Tað kenst løgið og veruleikafjart, at hesin maður, ið eina ferð hevði so stóran alsk til lívið, nú er burtur fyri altíð.

Eg var so heppin, at eg kom at arbeiða hjá Atna í útvið fimm góð ár. Tað kenst sum um tað er so stutt síðani, at eg ein heystardag í 1987 var til starvssamrøðu hjá Atna. Aftanfyri skrivaraborði sat hesin fryntligi maðurin við sínum klóka eygnabrá og lurtaði eftir míni klaksvíksdialekt við einum dámligum undirtóna av einum skálkabrosi. Væl gekk og hin 1. oktober 1987 varð mín fyrsti arbeiðsdagur á grannskoðaravirkinum, AJ-Grannskoðan, ið var virkið, ið Atni sjálvur átti.

Tá vóru góðar tíðir; eisini hjá Atna. Góðar tíðir vóru í Føroyum, nógv var at gera, og virkið hjá Atna gekk væl. Og ikki minst var hann tá nýklaktur pápi til fyrstfødda son sín, Sámal Jákup.

Sum arbeiðsgevari var Atni sjáldsama hegnigur. Hann dugdi sera væl at læra upp ein ungan, óroyndan mann við áhaldandi rósi og eggjan um ikki at halda seg aftur, tá ið krevjandi uppgávur skuldu loysast. Atni hevði ta gávu, at hann var altíð í góðum lag, og við skemti, góðum toli og yvirberandi lyndi gingu dagarnir lætt, og alla ta tíð eg arbeiddi hjá Atna fall ongantíð nakað øvugt orð millum okkum báðar.

Eg havi mangan hugsað um, at nógvir av teimum góðu arbeiðshættum, ið eg brúki í dagliga yrki mínum og sum eru mær sera hentir, havi eg lært av Atna.

Atni var verðsligur maður, ið hoyrdist har hann var. Við sínum sjáldsama bersøgni ivaðist ein ongantíð í, hvat hann helt ella hvar hann stóð her í verðini. Og sum vera man, so vóru tað ikki øll, ið dámdu sannleikan, tá ið hann varð borðreiddur úrlatin, hinvegin, so ivaðist tú ongantíð í, hvar tú hevði Atna og hvat hann meinti.

Gjøgnum arbeiðið gjørdust vit eisini vinmenn, og høvdu vit tí eisini mangar góðar løtur saman í vinarlag. Vit fiskaðu saman, veltu saman, flettu saman og annars alt tað, ið vinmenn hava saman. Atni var hjálpsamur, og tá eg í 1991-92 bygdi hús, var hann altíð fúsur at hjálpa.

Atni var eisini ein góður pápi fyri børn síni, tosaði nógv um tey og var errin av teimum. Tað vóru nógvir dagar, har ein fríløta bleiv tikin til ein gongutúr oman í viðalundina at geva dunnunum.

Og best sum alt sá so gott og ljóst út, so komu 1990'árini sníkjandi inn yvir okkum, og tær ringu tíðirnar byrjaðu; eisini fyri Atna. Tíðirnar í Føroyum gjørdust kargar, arbeiðið gjørdist minni, Atni misti pápa sín, og skipið, sum hann og beiggjarnir áttu, gekk burtur í Grønlandi.

Tá byrjaði heystið fyri Atna, og vit eru óivað mong, ið standa undrandi í dag og ikki rættiliga skilja, hvat hendi, og hví tað gekk sum tað gekk.

Tað er svárt at sita eftir, tá ið ein hevur mist mann sín, pápa sín, son sín og beiggja sín. Tað er lítil uggi, ið kann veitast í slíkari stund, men eg veit, at tit sum eftir sita, hava nógv góð minnir um Atna, og at hann hevur borið tykkum nógv gott. Harrin styrki tykkum í sorg tykkara.

Eg havi sjálvur tann ugga, at eg havi bert góð minnir um Atna. Eg havi eisini bert havt góðar løtur saman við Atna, og hann hevur bæði lært og givið mær gott.

Friður veri við minninum yvir Atna Jensen.

**Óli**

## Allan P. Gøtuskeggi
### føddur 2. juni 1972 – deyður 1. oktober 2000

Dátt kom tað við at frætta, at tú góði, Allan, so brádliga var heimkallaður til Harran, bert 28 ára gamal.

Tað fyrsta ein spyr tá so er, er hví? Men hetta fáa vit ikki svar uppá her. Men ein meining er við øllum.

Tú hevði so nógvar ætlanir. Tað var so nógv, tú hevði sett tær fyri at náa her í lívinum. Men tað verður ikki spurt eftir hvat vit ætla. Harrin kallaði teg heim. Honum tørvaði teg.

Allan var ein stillur og hjálpsamur drongur, ið setti alt sítt álit á Harran.

Hóast hann var nógv í Havn, so merktist mangan hvussu nógv hann hugsaði um tykkum í Gøtu.

Mær untist at kenna hann alt ov stutta tíð. Hóast tað, havi eg nógvar góðar løtur at minnast afturá saman við honum. Og nógv góð minnir havi eg eftir hann. Hann vildi øllum bara gott, var altíð klárur at hjálpa øðrum.

Eg minnist eitt kvøldið eg var stødd í Havn og var á veg til hús. Eg gekk einsamøll og hevði langan veg. Eg møtti Allani, hann steðgaði og spurdi, um hann ikki skuldi koyra meg. Hann helt ikki tað var rætt, at eg skuldi ganga aleina seint á kvøldi, tí eg skuldi langt út um býin.

Hetta segði mær, hvussu hann eisini hevði umsorgan fyri vinum sínum, eins og fyri sínum nærmastu. Hetta var heldur ikki einastu ferð eg upplivdi hansara umsorgan. Eg kundi skrivað so nógv gott um Allan, men orð eru so fátøk.

Góðu foreldur, systkin og tit, sum stóðu Allani nær. Saknurin er stórur. Tit hava enn einaferð mist ein góðan son og beiggja. Eg havi djúpa samkenslu við tykkum. Men ein dag skulu øll møtast aftur har heima.

Má Harrin styrkja tykkum í sorg tykkara.

Æra verði minnið um mín góða vin Allan.

**Katrin**

DAGFØR TEG
Tekna teg sum haldara nú, so fært tú Sosialin ókeypis restina av hesum ársfjórðinginum
Sosialurin
HALT
SOSIALIN

Tekna teg sum haldara, so fært tú sosialin 5 ferðir um vikuna til dyrnar

Tíðindablaðið
sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið
64

Undirritaði teknar seg sum haldara av Tíðindablaðnum Sosialinum, og fái blaðið *5 ferðir um vikuna.*
Restina av hesum ársfjórðingi fái eg Sosialin *ókeypis!*

Navn:
Búst.:
Postnr., bygd, býur:
Tlf.:
Undirskrift:

☐ Haldarar í Føroyum: 360,-/ársfj.
☐ Haldarar í Europa: 510,-/ársfj.
☐ 5 bløð einaferð um vikuna í Europa: 425,-/ársfj.
☐ Onnur lond: Ymiskir prísir
☐ Internet: 240,-/ársfj.
Sosialurin

Í býin
- altíð eitt stað at fara

Streymoy

Kaggin
Hóskvøldið spælir TAXI
Fríggjadagin Jólafimmarin v/gløggi
Fríggja.- og leygarkvøldið spælir Ólavur Øster Band
Annað jólakvøld spælir Ólavur Øster Band
ALLIR FÓTBÓLTSDYSTIR Á STÓRSKÝGGJA Í KAGGANUM
Kaggin
www.kaggin.fo

AUTO
- Dag sum nátt -
- skjótt og gott -
Skalt tú bil hýra
- so er tað 311234
AUTO
BENZIN
DIESEL
KIOSK
- ALT DØGNIÐ -
AUTO
311234

fk Matseðilin
Hósdagin 21. des.:
Høsnarungalær
Fríggjadagin 22. des.:
Rivjasteik
Leygardagin 23. des.:
Kálvasteik
Mikudagin 27. des.:
Bayonneskinka
Kostnaður 32,- kr.
***
Seinnaparts-TILBOÐ
frá kl. 14.00:
Juniorburgari 14,95
Maxiburgari *ella*
Búffsandwich 19,95
Matstovan í Hoyvík
Sosialurin - 311820

NÁTT-BUSSURIN
hjá Øssuri Christiansen
Leygarkvøldið:
• Úr Vestmanna kl. 24
• Úr Tórshavn kl. 01
• Úr Vestmanna kl. 04
• Úr Tórshavn kl. 05
(Koyrt verður um Kvívík og Kollafjørð, tá fráboðan fyriliggur)
Onnur kvøld kann koyrast eftir avtalu
Tlf. 424254
Bussarnir:
Tlf. 287752 • 286254

Norðurlandahúsið í Føroyum
Sí SVF tekstvarp s. 650

Eysturoy

Dansur í EYDNUNI á Oyrarbakka
2. jólakvøld spælir
BACON
til dans í Eydnuni
EYDNAN

JÓLA-DANSUR Á STRONDUM
Annað jólakvøld verður góður dansur á Strondum har Audio spælir góðan dansitónleik
Matstovan verður opin
STRÁLAN

Vilja tygum við í
*Í býin* - hvønn hósdag

Ynskja tygum at lýsa í teiginum *í býin*, so fyllið út henda lepan og sendið hann til **Sosialin, box 76, 110 Tórshavn** – ella fax 314720

Tekstur